gult cyan magenta svart

Tveir n‡ggir spælarar til B36

Darius Magdisauskas og Maciej Maryniak skulu styrkja um B36 li›i›, sum ikki hevur fingi› tey bestu úrslitini í seinastuni

STEFAN Í SKORINI

N‡ggju spælararnir eru bá›ir útlendingar, men eru ikki heilt ókunnigir vi› føroyskan fótbólt. 31 ára gamli Darius Magdisauskas er frá Litavia og hevur leikt vi› FS Vágum í fyrru hálvu, har hann hevur spælt í verjuni. Maciej Maryniak er 28 ára gamal og spælir í álopinum. Hann frá Póllandi og hevur fyrr leikt vi› ÍF, tá i› Piotr Krakowski var venjari har. Sviin Håkan Lundholm, sum hevur leikt í álopinum, sí›an John Petersen fór, ver›ur verandi í B36. Hann skeyt tvey av málunum su›uri á Sandi í 5-2 sigrinum móti B71, har hinir bá›ir n‡ggju spælararnir eisini sluppu at royna seg.

Ta› hevur ikki gingist serliga væl hjá B36, sí›an John Petersen fór til Leiftur, og bara tveir sigrar eru komnir til høldar eftir hansara fráfer›. Nú hevur felagi› fingi› tveir n‡ggjar spælarar til at styrkja sær um hópin, og ætlanin er uttan iva at gera seg galdandi í strí›num um meistaraheiti›. Eisini liggja tveir dystir ímóti danska superliga felagnum AB fyri framman.

B36 hevur í løtuni 18 stig saman vi› B68, tr‡ stig eru upp til VB og fimm til HB. Fyrsti dysturin eftir summarste›gin ver›ur 5. august á heimavølli móti B68.

Darius Magdisauskas, sum fyrru kappingarhálvu hevur leikt vi› FS Vágum, skal nú styrkja um verjupartin hjá B36

Í Sogndal vóru teir óhepnir

Noreg:
Føroyska li›i› misn‡tti brotsspark, og teir fingu eitt mál kolldømt, á›renn oddali›i› skora›i tvær fer›ir

Allir teir tríggir føroysku landsli›smenninir í Sogndal vóru á vøllinum allar 90 minuttirnar, tá Sogndal sunnukvøldi› hev›i vitjan av oddali›num Lyn. Høvu›ssta›arli›i› fór til hús aftur vi› øllum stigunum, og ta› var ikki at undrast á, at teir vóru væl nøgdir.

Lyn vann 2–1. Teir skora›u beinlei›is upp á frísprark í 35. minuttí, og f‡ra minuttir seinni øktu teir til 2–0. Álopsfelagin hjá Kurt Mørkøre, Tommy Øren minka›i um munin í 67. minutti.

Yvirvágin

929 ásko›arar vóru eygnavitni til, at heimali›i› tr‡sti størsta partin av tí›ini. Og teir í Sogndal vóru óhepnir, at teir ikki komu á odda. Fyrst fingu teir eitt brotsspark. Kanska skuldi Kurt Mørkøre, sum var vi› aftur, eftir at hann var leikbanna›ur næstseinast, tiki› sær av skotinum. Hann plagar at vera tryggur úr ellivu metrum. Royndin hjá Asle Hillestad var líti› sannførandi. Skoti› hev›i lítla fer›, og ta› fór beint til málverjan.

Tá ta› framvegis var málleyst, átti Sogndal at komi› á odda. Teir fingu bóltin í kassan, men dómarin, sum norsku fjølmi›larinir ikki halda var serliga sannførandi, koldømdi máli›.

So var ta›, at Lyn fekk tvey mál. Í 2. hálvleiki tr‡sti og tr‡sti Sogndal, men teir megna›u bara at skora eina fer›.

Allir teir føroysku spælararnir fáa í norska bla›num VG eitt fimm tal fyri sítt avrik. Ta› er mi›al.

Lyn er á odda í 1. deild vi› 40 stigum. Sogndal er á fimta plássi vi› 23 stigum. Flestu li›ini hava spælt fimtan dystir. Bara Sogndal og Byåsen, sum er tri›ji ni›ast, hava spælt fjúrtan dystir. Útsetti dysturin teirra millum ver›ur í Sogndal í anna›kvøld.

jh

Leiftur har›liga lending

Ísland:
Føroyska li›i› á Ólafsfir›i tapti stórt á heimavølli móti oddali›num, Akranes tapti í Vestmannaoyggjunum, og li›i› hjá Pálli Gu›laugsson fóta›i sær aftur eftir tapi› á Ólafsfir›i

Leygardagin søgdu vit frá fyrsta sigrinum í landskappingini hjá Leiftri, og at tr‡ av f‡ra málum vór›u skora› av føroyskum spælarum.

Í dag hava vit aftur tí›indi at bera um Leiftur, men tey eru ikki so hugalig, sum tey leygardagin vóru. Leiftur var sunnukvøldi› stutt sagt smurt av á heimavølli. Fylkir vitja›i, og oddali›i› setti tingini orduliga upp á pláss. Teir vunnu 7–1, og harvi› fingu Jens Martin Knudsen og hansara menn eina orduliga áminning um, at ta› ver›ur strevi› og torført hjá teimum at koma úr botninum.

Jens Martin Knudsen, Sámal Joensen og John Petersen vóru á li›num hjá Leiftri. Jens Erik Rasmussen er framvegis skaddur.

Ta› var í 2. hálvleiki, at Fylkir skora›i flestu málini. Í 31 minuttir noyddist Jens Martin Knudsen ikki færri enn seks fer›ir at taka bóltin úr netinum.

Spentu bogan

Fylkir var á odda 1–0 í ste›ginum. Í 2. hálvleiki royndu teir í Leiftri at javna. Teir royndu at flyta spæli› á mótstø›uhálvuna. At álopsbogin var› spentur hev›i vi› sær, at ta› gjørdist eitt sindur tynnri í aftaru rø›ini, og so fall álopshamarin hjá Fylkiri eirindarleysur.

Teir skora›u upp á brotsspark í 53. minuttir, og so skora›u teir aftur í 62., 64., 70. og 79. minutti. Alexandro Santos, brasilima›ur sum var skiftur inn á Leifturs li›i›, minka›i um munin í 81. minutti, og í 85. minutti slerdu Fylkirs menn sí›sta seymin í, tá teir enn eina fer› fingu brotsspark og skora›u.

ÍA eitt pláss aftur

Uni Arge og hinir í Akranesi høvdu ilt vi› at sleppa út í Vestmannaoyggjarnar. Dysturin var á skránni hóskvøldi›, men tá var hann av ongum, tí ta› vóru ikki floglíkindi. Tá teir royndu aftur fríggjadagin vóru heldur ikki floglíkindi.

Leygardagin eydna›ist ta› endiliga. Fyrsta bríksli› var longu klokkan eitt. Ta› gingu 77 minuttir, á›renn fyrsta og einasta máli› kom. Ta› fekk heimali›i›, og ta› vil siga, at ÍBV tók seg upp á fjór›a plássi›, og at ÍA datt ni›ur á fimta plássi›.

Flott av Pálli

Tri›ja føroyska li›i› í bestu deildini í Íslandi er Keflavík, har Páll Gu›laugsson er venjari. Hóskvøldi› tapti hann á Ólafsfir›i móti Leiftri, sum hann vandi bæ›i í fyrraári› og í fjør. Men sunnudagin gekk betur.

Keflavík hev›i vitjan av meistarali›num í fjør, KR. Páll og teir hava havt gott tak á KR í ár. Teir høvdu undan dystininum vunni› tvær fer›ir á teimum, og aftur hesa fer› eydna›ist ta›. Keflavík vann 1–0. Máli› skora›u teir í 78. minutti. KR er á tri›ja plássi vi› átjan stigum. Keflavík er sætta plássi vi› fimtan stigum – sama stigatali sum ÍA.

jh